Fólkanøvn í Streymoyar sýslu 1801

Eftir Jákup í Jákupsstovu.

Henda fjórða grein um fólkanøvn í Føroyum 1801 viðger fólkanøvnini í Streymoyar sýslu. Hinar fyrru greinirnar stóðu í 14., 15. og 16. bók av Fróðskaparriti og viðgjørdu fólkanøvnini sunnanfjørðs og í Vága sýslu.

Í Streymoyar sýslu búðu í 1801 1.677 fólk, t. e. slakur triðingur av Føroya fólki, sum tá taldi 5.265 fólk. Í høvuðsstaðnum Tórshavn búðu 554 fólk, og var tað triðingur av fólkinum í sýsluni ella stívur tíggjundapartur í landinum.

Prestagjøldini í Streymoyar sýslu vóru tvey: Suðurstreymoyar prestagjald við 973 íbúgvum og Norðstreymoyar prestagjald við 704 íbúgvum. Fyri fólkanøvnini hevur hetta tann týdning, at eitt sindur misjavnt er, hvussu teir báðir prestarnir skriva tey ymisku nøvnini, og prestarnir eru teir, sum skrivað hava manntalslistarnar, ið eru grundarlag undir hesi kanning av fólkanøvnum 1801.

Presturin Joachim Begtrup í Sandagerði skrivar t. d. Clement, Gregers, Halvdan, Margrethe, Sivert, Sigge, Trond, meðan starvsbróðirin Hans Leerbech á Kirkjuteigi í Kvívík skrivar: Clemen, Gregorius, Haldan, Magrethe, Sigvard, Zigge, Tronte.

Í hesi ritgerð verður enn eingin roynd gjørd til nakra endaliga samskipan av teimum ymsu navnaformunum, men vónandi eydnast við sama viðgerðarhátti sum higartil eisini at kanna fólkanøvnini í Eysturoy og í Norðoyum, so heildarúrslit fyri alt landið kunnu verða løgd fram.

Sundursetingin í bygdir og sóknir er sum í manntalslistanum og er henda:

		Personer
Thorshavns Sogn		
Thorshavn	554	
Sandegjerde	7	
Arge Hospital	7	
Aalekiær	3	
Höviig	19	
Nord-Dahl	11	
Syd-Dahl	7	
Tilsammen i Thorshavns Sogn		608
Kirkeböe Sogn		
Kirkeböe	48	
Kolter	30	
Hestöe	55	
Welbestad	53	
Tilsammen i Kirkeböe Sogn		186
Kalbaks Sogn		
Kalbak	66	
Sunds	13	
Tilsammen i Kalbaks Sogn		79
Kollefiord Sogn		
Kollefiord		134
Qualviig Sogn		
Qualviig	68	
Strennes	25	
Thorsviig	43	
Tilsammen i Qualviigs Sogn		136

	Personer	
Tiörneviig Sogn		
Tiörneviig	65	
Haldersviig	60	
Saxen	47	
Tilsammen i Tiörneviig Sogn		172
Westmanhavn Sogn		
Westmanhavn		126
Qvivig Sogn		
Qvivig	97	
Skælling	19	
Leinum	20	
Tilsammen i Qvivigs Sogn		136
		1677

Tórshavn

Thorshavns Bye, Huusegaard. Tilsamans 128 húski, 554 fólk.

Kvinnur:

1 Abellone
35 Anna
7 Anna Catrina
1 Anna Dorthea
8 Anna Elisabeth
1 Anna Helena
3 Anna Malene
3 Anna Margrethe
13 Anne Marie
6 Anne Sophie
3 Armgarth Maria
1 Bernhardine Chatrine
2 Berthe
4 Bille
3 Birgithe
15 Catrina
1 Charlotte Amalie
1 Christiane
1 Christiane Caroline
1 Christiane Elisabeth
5 Christine
2 Cicilia
1 Dorothea
1 Dorothea Elisabeth
3 Elisabeth
3 Elisabeth Catrine
2 Elisabeth Christine
4 Elen
1 Elen Chatrine
2 Elen Elisabeth
1 Elen Maria
1 Ellen Margrethe
1 Else Birgithe
1 Else Chatrine
1 Else Marie
18 Elsebeth
2 Elsebeth Catrine
1 Elsebeth Christine
2 Elsebeth Malene

Menn:

1 Adam
2 Anthonius
1 Augustinus
1 Carl Friderich
1 Christen
4 Christian
2 Christian Fridrich
1 Christian Ludvig
1 Christopher
1 Claus
2 Clement
3 Daniel
2 Daniel Jacob
1 Daniel Pauli
2 Dione
2 Gregers
1 Gutte
1 Haagen
2 Halvdan
12 Hans
1 Hans Andreas
2 Hans Jacob
1 Hans Lauritz
1 Hans Ludvig
1 Hans Pauli
2 Hans Peder
1 Harald
1 Heyne
2 Hendrich
1 Henrich Martin
2 Isach
19 Jacob
1 Jacob Andreas
1 Jacob Friderich
1 Jacob Hagæus
1 Jacob Mathias
1 Jacob Michael
2 Jens
2 Jens Christian

Kvinnur:

1 Eva Elisabeth
1 Eva Margretha
2 Fridericha
1 Giertrud
1 Grethe
1 Helene Christine
1 Henriette Christiane
1 Herborg
1 Inger Christiane
1 Inger Christine
4 Johanne
2 Johanne Marie
4 Juliane
2 Karen Catrina
1 Karen Christiane
2 Karen Christine
1 Karen Elisabeth
3 Lisbeth
9 Malene
34 Maren
1 Maren Catrina
1 Maren Malene
2 Maren Margrethe
1 Maren Regina
1 Maren Sophia
2 Maren Susanne
1 Maren Sybilla
3 Margrethe
1 Margrethe Elisabeth
2 Maria
3 Maria Elisabeth
4 Mariane
1 Mariane Sophie
3 Rachel
1 Rachel Sophie
2 Rebecka
3 Sara
1 Sara Maria
2 Sigge
1 Sigge Malene
1 Sigga Maria
1 Sophie Elisabeth

Menn:

1 Jens Friderich
1 Jens Henrich
1 Joachim
20 Joen
1 Johan
2 Johan Carl
1 Johan Henrich
4 Johan Peter
15 Johannes
2 Jörgen Christian
2 Jörgen Frantz
1 Jørgen Gad
1 Jørgen Martin
2 Lars
1 Lars Andreas
2 Lars Christian
1 Lauritz
1 Mads
1 Magnus
1 Magnus Peder
1 Mathias
1 Melchior Johan
10 Michel
3 Morten
5 Niclas
4 Nicolay
1 Niels
1 Niels Christopher
1 Niels Ryberg
1 Niels Ulrich
1 Olaus Johan
12 Ole
1 Ole Christian
1 Ole Hans
1 Ole Jacob
11 Peder
1 Peder Christian
1 Peder Lave
1 Peter Paul
11 Poul
2 Poul Andreas
1 Poul Johannes

Kvinnur:

1 Stine Malene
9 Sunneva
26 Susanne
1 Susanne Catrina
1 Susanne Marie

311 kvinnur í Tórshavn 1801

Menn:

3 Rasmus
3 Samuel
2 Samuel Jacob
5 Simon
1 Stephan
1 Sören
5 Thomas
1 Thomas Michael
1 Wenceslaus
2 Zacharias

243 menn í Tórshavn 1801

Sandagerði

Tilsamans 1 húski, 7 fólk.

Kvinnur:

2 Anne Maria
1 Anna Sophia
1 Chatrine

4 kvinnur í Sandagerði 1801

Menn:

1 Joachim
1 Lars Christian
1 Ove Christian Fridrik

3 menn í Sandagerði 1801

Argir

Arge Hospital. 1 húski, 7 fólk.

Kvinnur:

1 Maren
2 Susanne

3 kvinnur á Argjum 1801

Menn:

1 Jens
1 Jörgen Christian
1 Nicolay
1 Torkil

4 menn á Argjum 1801

Álaker

Tilsamans 1 húski, 3 fólk.

Kvinnur:

1 Anna

1 kvinna í Álakeri 1801

Menn:

1 Jacob
1 Ole

2 menn í Álakeri 1801

Hoyvík

Tilsamans 2 húski, 19 fólk.

Kvinnur:

3 Anne
1 Barbara
1 Elisabeth Mariane
1 Elsebeth
1 Lisbeth Catrine
1 Maren
1 Sophie

9 kvinnur í Hoyvík 1801

Menn:

1 Augustinus
1 Christian
1 Heyne
1 Joen
1 Johannes
1 Mourits
1 Mourits Daniel
2 Ole
1 Trond

10 menn í Hoyvík 1801

Norðradalur

Tilsamans 2 húski, 11 fólk.

Kvinnur:

1 Anna Maria
1 Elsebeth
1 Maren
1 Sara

4 kvinnur í Norðradali 1801

Menn:

1 Hans
2 Joen
1 Michel
2 Niclas
1 Peder

7 menn í Norðradali 1801

Syðradalur

Tilsamans 1 húski, 7 fólk.

Kvinnur:

1 Anna Catrina
1 Elsebeth
1 Marie
1 Susanne

4 kvinnur í Syðradali 1801

Menn:

1 Christian
1 Hans
1 Michel

3 menn í Syðradali 1801

Kirkjubøur

Tilsamans 2 húski, 48 fólk.

Kvinnur:

1 Anne
2 Anne Malene
1 Anne Margrethe
1 Christiane
1 Dorthea
1 Elen
2 Elsebeth
1 Kirstine
1 Malene
1 Mette
1 Rachel
1 Rebekka
2 Sigga
1 Sigga Dorthea
1 Sigga Malena
2 Sunneva

20 kvinnur í Kirkjubø 1801

Menn:

1 Andreas
2 Christian
2 Daniel
1 Erich
1 Hans
1 Isach
5 Jacob
1 Jens
2 Joen
1 Joen Ole
1 Michel
3 Ole
1 Peder
4 Poul
1 Samuel
1 Simon

28 menn í Kirkjubø 1801

Velbastaður

Tilsamans 11 húski, 53 fólk.

Kvinnur:

2 Anne
3 Billa
1 Elen
1 Elisabeth
3 Elsebeth
2 Juliane
3 Malene
3 Maren
1 Rachel
1 Sigga
1 Sunneva
1 Susanne

22 kvinnur á Velbastað 1801

Menn:

1 Christian
1 Daniel
1 Daniel Pauli
2 Dione
1 Henrich
1 Isak
1 Jacob
3 Joen
1 Joen Henrich
5 Johannes
1 Michel
1 Morten
2 Niclas
2 Ole
2 Poul
1 Samuel
2 Simon
2 Thomas
1 Trond

31 menn á Velbastað 1801

Koltur

Tilsamans 4 húski, 30 fólk.

Kvinnur:

1 Anna
1 Anne Johanne
1 Anna Katrina
1 Friderícha
1 Katrine
6 Malene
1 Maren
3 Susanne

15 kvinnur í Koltri 1801

Menn:

1 Christian
1 Daniel
3 Hans
1 Heine
1 Johannes
2 Niclas
3 Ole
1 Poul
1 Rasmus
1 Thomas

15 menn í Koltri 1801

Hestur

Tilsamans 11 húski, 55 fólk.

Kvinnur:

3 Anne
1 Anne Catrine
2 Bille
2 Cathrine
2 Elen
1 Elen Marie
2 Elsebeth
1 Elsebeth Malene
1 Inger Elisabeth
1 Johanne
1 Lisbeth
4 Maren
1 Rachel
2 Sunneva

24 kvinnur í Hesti 1801

Menn:

1 Christian
2 Clement
1 Colbiörn
1 Daniel
7 Hans
2 Henrich
1 Jacob
6 Joen
1 Johannes
1 Morten
1 Niclas
1 Ole Christian
1 Peder
3 Poul
1 Rasmus
1 Sivert

31 menn í Hesti 1801

Nólsoy

Tilsamans 19 húski, 100 fólk.

Kvinnur:

1 Ada
6 Anna
1 Anna Cathrine
1 Anne Margrethe
1 Anna Sophia
1 Catrine Malene
1 Christine
1 Elen Maria
6 Elsebeth
1 Elsebeth Malene
1 Gurin
1 Inger
1 Johanne
1 Katrine
6 Malene
5 Maren
2 Maren Sophia
1 Maren Susanna
1 Marie Kirstine
1 Sara Malene
2 Sigge
1 Sunneva
5 Susanne
1 Susanne Cathrina
1 Susanne Malene

50 kvinnur í Nólsoy 1801

Menn:

1 Anthonius
2 Christian
1 Clement
2 Daniel
2 Dione
1 Gabriel
5 Hans
5 Jacob
1 Jan
12 Joen
5 Johannes
1 Michel
2 Niclas
3 Peder
3 Poul
3 Thomas
1 Thomas Pauli

50 menn í Nólsoy 1801

Sund

Tilsamans 1 húski, 13 fólk.

Kvinnur:

1 Anna
1 Sara Malena
1 Sigga
1 Susanne Maria

4 kvinnur á Sundi 1801

Menn:

1 Abraham
1 Berent
1 Daniel
1 Isach
1 Jacob
1 Johannes
1 Lucas
1 Michel
1 Niclas

9 menn á Sundi 1801

Kaldbak

Tilsamans 12 húski, 66 fólk.

Kvinnur:

1 Ada
1 Agnethe
4 Anne
1 Anne Lisbeth
2 Anne Sophia
1 Birgithe
1 Catrine
1 Charlotte
1 Christiane
1 Else Catrine
2 Elsebeth
1 Elsebeth Christiane
1 Elsebeth Malene
1 Juliane
1 Kirstine
1 Lorentze
2 Malene
4 Maren
1 Rachel
1 Sara
1 Sophia
2 Sunneva

32 kvinnur í Kaldbak 1801

Menn:

2 Andreas
1 Augustinus
2 Berent
1 Daniel
3 Hans
1 Heine
2 Jacob
4 Joen
1 Johannes
1 Michel
2 Ole
2 Peder
7 Poul
1 Poul Rasmus
1 Rasmus
1 Stephan
2 Thomas

34 menn í Kaldbak 1801

Kollafjørður

Hamre, Kielnes, Midjord, Todnes, Siov, Øreenge, Signeböe, Hegjie. Tilsamans 27 húski, 134 fólk.

Kvinnur:

1 Agethe
1 Ane Chirstine
1 Ane Elsebeth Frideriche
1 Ane Magrethe
2 Anne
2 Anne Lisbeth
1 Anne Malene
1 Anne Marie
1 Anne Sophie
1 Birthe
6 Catrine
1 Catrine Malene
1 Christiane Catrine
1 Chirstine Malene
1 Ellen
4 Elsebeth
1 Elsebeth Lene
1 Frideriche Sophie
1 Grethe
1 Helen Marie Elisabeth
1 Hellana
1 Inger Anne Marie
1 Johanne
1 Johanne Elisabeth Marie
1 Johanne Lisbeth
1 Johanne Marie
3 Juliane
1 Juliane Johanne Marie
1 Kiersten
3 Lisbeth
7 Malene
5 Maren
1 Maren Sophie
1 Marie
1 Mariane Catrine
1 Sara Maria
1 Sunneva
8 Susanna
1 Susanne Marie

70 kvinnur í Kollafirði 1801

Menn:

2 Andreas
2 Bernth
1 Christen
3 Daniel
1 Daniel Peter
1 Diderich
2 Hans
1 Hans Nicolai
1 Hans Peter
1 Iver
4 Jacob
2 Jens
1 Jens Christian
1 Jens Henrich
1 Jens Nicolai
7 Joen
1 Johan Christian Friderich
5 Johannes
3 Michel
2 Niclas
1 Nicolai
1 Ole
1 Oluf Christian
2 Peter
8 Poul
1 Poul Johannes
2 Samuel
1 Simon
1 Simon Peter
1 Sören
1 Theanjardus
2 Thomas

64 menn í Kollafirði 1801

Hósvík

Tilsamans 7 húski, 43 fólk.

Kvinnur:

2 Anne
1 Anne Catrine
1 Anne Elsebeth Frideriche
1 Anne Marie
1 Anne Sophie
1 Catrine
1 Ellen Marie
3 Elsebeth
1 Johanne Marie
1 Lisbeth
2 Magge
1 Magge Kirstine
1 Magrethe
1 Maren
1 Rachel
2 Zigge

21 kvinnur í Hósvík 1801

Menn:

1 Berthel
1 David
4 Hans
4 Jacob
3 Joen
1 Joen Simon
1 Johan Peter
1 Johannes
2 Magnus
1 Ole Jacob
2 Peter
1 Poul

22 menn í Hósvík 1801

Hvalvík

Tilsamans 8 húski, 68 fólk.

Kvinnur:

1 Aneke Hedevig
1 Anne Marie
2 Anne Sophie
1 Bidle
1 Birgitte Helene
1 Birthe
4 Catrine
1 Catrine Marie
1 Ellen Catrine
1 Ellen Marie
1 Ellen Sophie
2 Elsebeth
1 Grethe
1 Lisbeth
1 Magge
1 Magge Sophie
1 Magge Susanne
1 Magrethe Susanne
3 Malene
3 Maren
1 Maren Elsebeth Magrethe
1 Sunneva
3 Susanna
1 Zigge

35 kvinnur í Hvalvík 1801

Menn:

4 Hans
1 Isach
6 Jacob
1 Jens
6 Joen
1 Johan Henrich
4 Johannes
1 Michael
1 Niclas
1 Niels Peter
2 Poul
2 Thomas
1 Thomas Michael
1 Wenicelaus Andreas
1 Zacharias

33 menn í Hvalvík 1801

Streymnes

Tilsamans 5 húski, 25 fólk.

Kvinnur::

3 Anne
1 Anne Catrine
1 Anne Malene
1 Barbara
1 Barbara Sophie
1 Ellen
1 Elsebeth
1 Malene
4 Maren

14 kvinnur í Streymnesi 1801

Menn:

1 Christian
1 Hans
1 Heine
1 Jacob
2 Johannes
2 Ole
1 Ole Christian
1 Peter
1 Zacharias

11 menn í Streymnesi 1801

Haldórsvík

Tilsamans 13 húski, 60 fólk.

Kvinnur:

2 Anne
1 Anne Catrine
2 Anne Marie
2 Anne Sophie
1 Bidle
1 Birthe
4 Catrine
1 Ellen Marie
1 Elsebeth Malene
1 Johanne
3 Maren
2 Sunneva
4 Susanne
1 Zigge
1 Zigge Sophie

27 kvinnur í Vík 1801

Menn:

2 Abraham
3 Andreas
1 David
2 Gutte
2 Hans
1 Heine
3 Henrich
4 Jacob
6 Joen
2 Johannes
1 Michel
1 Ole
2 Peter
1 Poul
1 Samuel
1 Sigvard

33 menn í Vík 1801

Tjörnuvík

Tilsamans 12 húski, 65 fólk.

Kvinnur:

1 Agethe
5 Anne
1 Anne Catrine
2 Anne Malene
1 Anne Marie
2 Birgitte
1 Catrine
1 Christiane
1 Christine
1 Ellen Sophie
2 Elsebeth
1 Magge
1 Magrethe
3 Malene
4 Maren
1 Maren Catrine
1 Suneva
2 Susanne
2 Zigge

33 kvinnur í Tjørnuvík 1801

Menn:

1 Andreas
1 Berthel
5 David
1 Gutte
2 Hans
3 Heine
2 Herman
4 Jacob
1 Jacob Zacharias
4 Joen
1 Johannes
1 Mathias
2 Michel
2 Ole
2 Poul

32 menn í Tjørnuvík 1801

Saksun

Duegaard, Svarta, Qvigirhammer. Tilsamans 7 húski, 47 fólk.

Kvinnur:

2 Anne
1 Anne Sophie
1 Birgitte
3 Catrine
2 Ellen
1 Ellen Marie
2 Elsebeth
1 Frideriche
1 Juliane
2 Maren
1 Sophie
1 Susanna
2 Zigge

20 kvinnur í Saksun 1801

Menn:

1 Andreas
1 Clemen
1 Daniel
1 David
2 Hans
1 Heine
1 Isach
6 Joen
1 Joen Peter
3 Johannes
1 Niclas
2 Ole
1 Peter
3 Poul
1 Tronte
1 Zacharias

27 menn í Saksun 1801

Vestmanna

Heium, Tofte, Görum, Skaale, Regve. Tilsamans 22 húski, 126 fólk.

Kvinnur:

1 Agethe
8 Anne
1 Anne Catrine
1 Anne Marie
3 Anne Sophie
1 Birthe
2 Catrine
1 Christiane
1 Christine
1 Ellen
6 Elsebeth
1 Johanne Sophie
2 Juliane
3 Lisbeth
1 Magge Marie
1 Magrethe
1 Magrethe Sophie
2 Malene
7 Maren
1 Maren Sophie
1 Sophie
3 Sunneva
3 Susanne
1 Valborg
2 Zigge
2 Zigge Catrine
1 Zigge Sophie

58 kvinnur í Vestmanna 1801

Menn:

1 Abraham
1 Berthel
1 Christopher
1 Daniel
2 Gregorius
2 Gutte
2 Haldan
4 Hans
2 Heine
1 Isach
7 Jacob
7 Joen
1 Johan
9 Johannes
1 Lars
4 Michel
3 Niclas
2 Ole
2 Peter
5 Poul
2 Samuel
1 Søren
5 Thomas
2 Zacharias

68 menn í Vestmanna 1801

Kvívík

Tilsamans 23 húski, 97 fólk.

Kvinnur:

3 Agethe
2 Agnete
8 Anne
3 Anne Catrine
2 Anne Magrethe
4 Anne Marie
1 Anne Sophie
1 Birthe
5 Catrine
2 Catrine Marie
5 Elsebeth
1 Grete
2 Johanne
1 Johanne Frideriche
1 Lisbeth
1 Malene
5 Maren
1 Marie
1 Marthe
1 Rachel
1 Sunneva
2 Susanna
1 Zigge

54 kvinnur í Kvívík 1801

Menn:

1 Antonius
1 Augustinus
1 Daniel
1 Daniel Jacob
1 David
1 Elias
2 Hans
1 Hans Zacharias
1 Iver
2 Jacob
1 Jacob Zacharias
1 Jens
10 Joen
3 Johannes
2 Michel
3 Niclas
4 Ole
1 Ole Jacob
1 Peter
1 Poul
1 Samuel
1 Samuel Jacob
1 Samuel Johan
1 Simon

43 menn í Kvívík 1801

Leynar

Tilsamans 3 húski, 20 fólk.

Kvinnur:

2 Anne
1 Anne Sophie
1 Catrine
2 Elsebeth
1 Elsebeth Lene
1 Magrethe

8 kvinnur í Leynum 1801

Menn:

1 Haldan
1 Hans
2 Jacob
2 Joen
1 Michel
1 Niclas
2 Ole
1 Ole Christian
1 Thomas

12 menn í Leynum 1801

Skælingur

Tilsamans 3 húski, 19 fólk.

Kvinnur:

1 Anne
1 Anne Sophie
1 Elsebeth
3 Lisbeth
1 Maren
1 Zigga Maria

8 kvinnur á Skælingi 1801

Menn:

1 Antonius
1 Hans
1 Heine
3 Joen
1 Johannes
1 Niclas
1 Peter
1 Poul
1 Samuel Johan

11 menn á Skælingi 1801

Kvinnunøvn í Streymoyar sýslu 1801

1 *Abellone* er 14 ára genta í Tórshavn.
2 *Ada* eru 45 ára kona í Nólsoy og 21 ára kona í Kaldbak.
6 *Agethe* eru tvær konur og eitt barn í Kvívík, kona í Kollafirði, einkja í Vestmanna og eitt smábarn í Tjørnuvík.
3 *Agnete* eru 93 ára omma og 12 ára ommudóttir í Kvívík, og 61 ára gomul genta í Kaldbak.
Amalie finst bara í samanseting Charlotte A.
Aneke finst bara í samanseting A. Hedevig.
1 *Aneke Hedevig* Diurhuus er 29 ára bóndakona í Hvalvík.
92 *Anne* eru í øllum bygdum, og A. er vanligasta kvinnunavn í Streymoyar sýslu 1801. Umframt tær 92, ið hava A. sum einasta fornavn, eru 103, ið hava A. sum fremra navn av tveimum, og ein kvinna við trimum fornøvnum hevur A. teirra millum. Í nøkrum førum er stavsetingin Ane.
18 *Anne Catrine* eru í øllum sóknum uttan Kaldbaks og Kollafjarðar sóknum. Sí eisini Anna Katrina.
1 *Ane Chirstine* Dam er 76 ára einkja í Kollafirði.
1 *Anna Dorthea* er 21 ára kona í Tórshavn.
8 *Anna Elisabeth* eru allar í Tórshavn. Aldur: 13—44 ár.
2 *Anne Elsebeth Frideriche* eru tvær 3 og 4 ára gentur í Kollafirði og í Hósvík.
1 *Anna Helena* er 14 ára genta í Tórshavn.
1 *Anne Johanne* er 38 ára kona í Koltri.
1 *Anna Katrina* er 13 ára genta í Koltri. Sí eisini Anne Catrine.
3 *Anne Lisbeth* eru 38 ára kona og 20 ára genta í Kollafirði, og ein 21 ára genta í Kaldbak.
9 *Anna Malene* eru tríggjar í Tórshavn, tvær í Kirkjubø, tvær í Tjørnuvík, ein í Kollafirði og ein í Streymnesi. Uttan fyri Tórshavn og Kirkjubø er eingin A. M. eldri enn 20 ár.
8 *Anne Margrethe* eru tríggjar í Tórshavn, ein í Kirkjubø

og ein í Nólsoy. Tvær eru í Kvívík og ein í Kollafirði. Hesar tríggjar í Norðstreymoy eru skrivaðar Ane Magrethe.

27 *Anne Marie* eru í øllum sóknum uttan Kirkjubøar, Nólsoyar og Kaldbaks sóknum. Størri helmingurin er yngri enn 10 ár.

23 *Anne Sophie* eru í øllum sóknum uttan Kirkjubøar sókn. Tjúgu A. S. eru yngri enn 35 ár.

Armgarth finst bara í samanseting A. Maria.

3 *Armgarth Maria* eru tær báðar A. M. Svabo og A. M. Egholm, 63—66 ár, og ein 10 ára ommudóttir hesa seinnu.

2 *Barbara,* báðar 43 ár, kona í Streymnesi og genta í Hoyvík.

1 *Barbara Sophie* er 2 ára dóttir Barbaru í Streymnesi.

Bernhardine finst bara í samanseting B. Chatrine.

1 *Bernhardine Chatrine* er 26 ára ógifta dóttir H. M. Schnell, chirurgus.

2 *Berthe* eru 50 ára einkja og 40 ára genta, báðar í Tórshavn. Sí eisini Birthe.

11 *Bille* eru fýra í Tórshavn, tríggjar á Velbastað, tvær í Hesti, ein í Hvalvík og ein í Vík. Aldur: 14—73 ár. Tær tríggjar á Velbastað eru skrivaðar Billa, og tær tvær í Norðstreymoy eru skrivaðar Bidle.

7 *Birgithe* eru tríggjar í Tórshavn, ein í Kaldbak, tvær í Tjørnuvík og ein í Saksun. Aldur: 9—52 ár. Sí eisini B. Helene og Else B.

1 *Birgitte Helene* Egholm er 14 ára bóndadóttir í Hvalvík.

5 *Birthe* eru í Norðstreymoy: Kollafirði, Hvalvík, Haldórsvík, Vestmanna og í Kvívík. Aldur: 2—46 ár. Sí eisini Berthe.

Caroline finst bara í samanseting Christiane C.

46 *Catrine* eru í øllum sóknum uttan í Nólsoy; men har og í Koltri er Katrine. Eisine er C. fyrra navn í samansetingunum C. Malene og C. Marie, og seinna navn í fjúrtan ymiskum samansetingum.

2 *Catrine Malene* eru 22 og 10 ára gentur ávikavist í Nólsoy og í Kollafirði.

3 *Catrine Marie* eru tvær 15—17 ára gentur í Kvívík og eitt 2 ára barn í Hvalvík.
1 *Charlotte* er 24 ára kona í Kaldbak, og
1 *Charlotte Amalie* Als er 18 ára prestadóttir í Tórshavn.
5 *Christiane* eru ungar gentur og børn í Tórshavn, Kirkjubø, Kaldbak, Tjørnuvík og Vestmanna. Aldur 2—22 ár. Haraftrat er C. fyrra navn í trimum samansetingum og seinna navn í fýra samansetingum.
1 *Christiane Caroline* er 35 ára kona setta handilsfyrisitarans í Tórshavn.
1 *Christiane Catrine* er 25 ára systir konu Sjóvarbóndans í Kollafirði.
1 *Christiane Elisabeth* er 7 ára dóttir fráfarna handilsfyrisitarans í Tórshavn.
8 *Christine* eru fimm í Tórshavn, ein í Nólsoy, ein í Vestmanna og ein í Tjørnuvík. Aldur 21—79 ár. C. er fyrra navn í samanseting C. Malene og seinna navn í fleiri samansetingum. Sí eisini Kirstine.
1 *Chirstine Malene* er 12 ára genta í Kollafirði.
2 *Cicilia,* báðar í Tórshavn. Aldur: 25—35 ár.
2 *Dorothea,* 41 ára gomul genta í Tórshavn og 16 ára genta í Kirkjubø. Henda seinna er skrivað Dorthea. Sí eisini Anna D., Sigga D. og D. Elisabeth.
1 *Dorothea Elisabeth* er 5 ára smágenta í Tórshavn.
Elen, sí Ellen.
4 *Elisabeth* eru tríggjar í Tórshavn og ein á Velbastað. Aldur: 10—72 ár. Haraftrat er E. fyrra navn í trimum samansetingum, seinna navn í tíggju samansetingum, og eitt av trimum fornøvnum í tveimum førum. Sí eisini Lisbeth.
3 *Elisabeth Catrine,* allar í Tórshavn. Aldur: 84, 33 og 5 ár.
2 *Elisabeth Christine,* báðar í Tórshavn. Aldur: 33—34 ár.
1 *Elisabeth Mariane* Hammershaimb er 22 ára ógift abbadóttir bóndans í Hoyvík.
13 *Ellen* eru fýra í Tórshavn, ein í Kirkjubø, ein á Velba-

stað, tvær í Hesti, ein í Kollafirði, ein í Streymnesi, ein í Vestmanna og tvær í Saksun. Aldur: 7—76 ár. Tær fýra í Kirkjubøar sókn og ein í Tórshavn eru skrivaðar Elen.

2 *Ellen Catrine* eru 14 ára genta í Hvalvík og 22 ára arbeiðskona á Húsagarði í Tórshavn. Henda seinna er skrivað Elen Chatrine Karbech.

2 *Ellen Elisabeth* eru 25 ára bóndakona á Húsagarði og 24 ára ógift dóttir snikkarans Jacob Mathias Karbech í Tórshavn. Henda seinna er stavsett Elen Elisabeth.

1 *Ellen Margrethe* er ársgomul dóttir timburmansins Thomas Olesens í Tórshavn.

7 *Ellen Marie* eru ein í hvørjari av bygdunum: Tórshavn, Hesti, Nólsoy, Hósvík, Hvalvík, Vík og Saksun. Aldur: 2—33 ár. Tær tríggjar í Suðurstreymoy eru skrivaðar Elen Marie ella Elen Maria.

2 *Ellen Sophie* eru 30 ára bóndakona í Hvalvík og 18 ára arbeiðskona í Tjørnuvík.

Else finst bara sum fremra navn av tveimum fornøvnum. Sí eisini Elsebeth.

1 *Else Birgithe* er 15 ára dóttir fráfarna handilsfyrisitarans í Tórshavn.

2 *Else Catrine* eru 15 ára genta í Tórshavn og ársgamalt barn í Kaldbak.

1 *Else Marie* Winther er 50 ára prestaeinkja í Tórshavn.

64 *Elsebeth* eru í øllum sóknum, og haraftrat eru 12, ið hava E. sum fremra navn av tveimum, og 3 hava E. sum mittasta av trimum fornøvnum.

2 *Elsebeth Catrine*, báðar í Tórshavn, 10 og 22 ár.

1 *Elsebeth Christiane* er 2 ára bóndadóttir í Kaldbak.

1 *Elsebeth Christine* er 24 ára seinna kona Peter Hansen, skipara, í Tórshavn.

2 *Elsebeth Lene* eru 26 ára ógift bóndadóttir í Leynum og 16 ára arbeiðskona í Kollafirði.

6 *Elsebeth Malene* eru tvær í Tórshavn og ein í hvørjari av bygdunum: Hesti, Nólsoy, Kaldbak og Haldórsvík. Aldur: 35—1 ár.

Eva finst bara í samansetingum: E. Elisabeth og E. Margretha.

1 *Eva Elisabeth* er 57 ára kona Chr. Fr. Lund í Tórshavn.

1 *Eva Margretha* er 63 ára ógift matmóðir í Tórshavn.

4 *Fridericha* eru tvær í Tórshavn, 50 og 14 ár, ein 16 ára arbeiðskona í Koltri og ein 5 ára fosturdóttir bóndans í Dúvugørðum í Saksun. Afturat hesum 4 F. er ein, sum hevur F. sum fyrra navn av tveimum fornøvnum, ein hevur F. sum seinna navn og tvær hava F. sum síðsta fornavn av trimum.

1 *Friderichе Sophie* er ársgomul bóndadóttir á Oyrareingjum í Kollafirði.

1 *Giertrud* Widerøe, 66 ár og ógift, »huusarm Krøbling og sengeliggende« í Tórshavn.

4 *Grethe* eru ein í hvørjari av bygdunum Kvívík, Kollafirði, Hvalvík og í Tórshavn. Aldur: 3—82 ár.

1 *Gurin* er 77 ára bóndakona úti í Nólsoy.

Hedevig finst bara í samanseting Aneke H.

Helen finst bara í samanseting H. Marie Elisabeth.

1 *Helen Marie Elisabeth* er 7 ára bóndadóttir á Oyrareingjum í Kollafirði.

Helene finst bara í samansetingum H. Christine, Anna H. og Birgitte H.

1 *Helene Christine* Egholm er 34 ára matmóðir í Tórshavn.

1 *Hellana* Wang, f. Diurhuus er 66 ára presta-einkja í Kollafirði.

Henriette finst bara í samanseting H. Christiane.

1 *Henriette Christiane* Debes er 13 ára genta í Tórshavn.

1 *Herborg* er 20 ára arbeiðskona gamla rektarans í Tórshavn.

1 *Inger* er 39 ára bóndakona úti í Nólsoy.

1 *Inger Anne Marie* Dam f. Wang er 29 ára bóndakona á Oyrareingjum í Kollafirði.

1 *Inger Christiane* er 28 ára húsmóðir í Tórshavn.

1 *Inger Christine* er 37 ára húsmóðir í Tórshavn.

1 *Inger Elisabeth* er 20 ára húsmóðir í Hesti.

10 *Johanne* eru fýra 7—8 ára gentur í Tórshavn, 50 ára bóndakona á Signabø, 44 ára gomul genta í Hesti, ein í Nólsoy, ein í Vík og tvær í Kvívík. Hesar fýra síðstnevndu allar yngri enn 14 ár. Umframt at vera einsamalt fornavn og fremsta navn av tveimum og trimum fornøvnum er J. eisini seinna navn í samanseting Anne J. og mittasta navn í samanseting Juliane J. Marie.

1 *Johanne Elisabeth Marie* er trý ára barn í Kollafirði.

1 *Johanne Frideriche* Bergmann er 24 ára prestakona í Kvívík.

1 *Johanne Lisbeth* er 15 ára arbeiðskona í Kollafirði.

4 *Johanne Marie* eru tvær 9 ára gentur í Tórshavn, ein 30 ára bóndakona í Kollafirði og ein 17 ára bóndadóttir í Hósvík.

1 *Johanne Sophie* er 4 ára bóndadóttir á Heygum í Vestmanna.

13 *Juliane* eru fýra í Tórshavn, tvær á Velbastað, ein í Kaldbak, tríggjar í Kollafirði, tvær í Vestmanna og ein í Saksun. Aldur: 1—88 ár.

1 *Juliane Johanne Marie* er trý ára smágenta í Kollafirði.

Karen finst bara sum fremra navn í samansetingum.

2 *Karen Cathrina* eru 50 ára einkja og 3 ára smágenta, báðar í Tórshavn.

1 *Karen Christiane* er 33 ára einkja í Tórshavn.

2 *Karen Christine* eru 23 og 16 ára gentur, báðar í Tórshavn.

1 *Karen Elisabeth* er 16 ára dóttir Mads Winther »Under Kiøbmand ved Handelen«.

2 *Katrine* eru 50 ára móðir Onnu K. í Koltri og 8 ára smágenta í Nólsoy. Sí eisini Catrine.

1 *Kiersten*, 30 ár og ógift, tænir hjá presta-einkjuni í Kollafirði.

2 *Kirstine* eru 57 ára kona í Kaldbak og 54 ára ógifta systir Sámals bónda í Kirkjubø. Sí eisini Magge K., Maria K. og Chirstine.

Lene finst bara í samanseting Elsebeth L.

16 *Lisbeth* eru tríggjar í Tórshavn, ein í Hesti, tríggjar í

Kollafirði, ein í Hósvík, ein í Hvalvík, tríggjar í Vestmanna, ein í Kvívík og tríggjar á Skælingi. Aldur: 68—13 ár. Umframt hesar 16 L. eru 4,ið hava L. sum seinna navn av tveimum, og ein hevur L. sum fremra av tveimum fornøvnum. Sí eisini Elisabeth.

1 *Lisbeth Catrine* er 24 ára »vanvittig« genta í Hoyvík.

1 *Lorentze* er 42 ára bóndakona í Kaldbak.

4 *Magge* eru tvær í Hósvík, ein í Hvalvík og ein í Tjørnuvík. Aldur 53—4 ár. Har aftrat eru 4,ið hava M. sum fyrra navn av tveimum fornøvnum.

1 *Magge Kirstine* er 24 ára ógift bóndadóttir í Hósvík.

1 *Magge Marie* er 16 ára ógift bóndadóttir í Vestmanna.

1 *Magge Sophie* er 4 ára bóndadóttir í Hvalvík.

1 *Magge Susanne* er 5 ára húsmansdóttir í Hvalvík.

44 *Malene* eru í øllum sóknum og í øllum aldri, og haraftrat eru 16 ið hava M. sum seinna navn av tveimum fornøvnum.

89 *Maren* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Haraftrat eru 16,ið hava M. sum fremra navn av tveimum ella fremsta navn av trimum fornøvnum.

2 *Maren Catrine* eru 6 ára genta í Tórshavn og 5 ára genta í Tjørnuvík.

1 *Maren Elsebeth Magrethe* er 2 ára bóndadóttir í Hvalvík.

1 *Maren Malene* er 34 ára kona í Tórshavn.

2 *Maren Margrethe,* báðar í Tórshavn, 14 og 4 ár.

1 *Maren Regina* er 11 ára genta í Tórshavn.

5 *Maren Sophia* eru ein í Tórshavn, tvær í Nólsoy, ein í Kollafirði og ein í Vestmanna. Allar yngri enn 17 ár.

3 *Maren Susanna,* tvær í Tórshavn og ein í Nólsoy. Allar yngri enn 19 ár.

1 *Maren Sybilla* er 26 ára kona trummusláarans í Tórshavn.

7 *Margrethe* eru tríggjar í Tórshavn, ein í Hósvík, ein í Tjørnuvík, ein í Vestmanna og ein í Leynum. Aldur: 2—60 ár. Tær fýra í Norðstreymoy eru skrivaðar Magrethe. Aftrat hesum 7 eru 3,ið hava M. sum fyrra navn av tveimum, 12 hava M. sum seinna navn av tveimum og

ein hevur M. sum tað síðsta av trimum fornøvnum.

1 *Margrethe Elisabeth* er 44 ára kona í Tórshavn.

1 *Magrethe Sophie* er 8 ára bóndadóttir á Gørðum í Vestmanna.

1 *Magrethe Susanne* er 11 ára bóndadóttir í Hvalvík.

5 *Maria* eru tvær í Tórshavn, ein í Syðradali, ein í Kollafirði og ein í Kvívík. Aldur: 8—63 ár. Aftrat hesum eru 4,ið hava M. sum fyrra navn av tveimum, 53 hava M. sum seinna navn av tveimum, ein hevur M. sum mittasta navn av trimum, og 3 hava M. sum síðsta navn av trimum fornøvnum.

3 *Maria Elisabeth* eru 40 ára matmóðir og tvær 2—3 ára smágentur, allar í Tórshavn.

1 *Marie Kirstine* er 11 ára genta úti í Nólsoy.

4 *Mariane,* allar í Tórshavn, og allar yngri enn 13 ár. Haraftrat eru 2,ið hava M. sum fyrra navn av tveimum fornøvnum, og ein hevur M. sum seinna fornavn.

1 *Mariane Catrine* er 13 ára bóndadóttir á Signabø í Kollafirði.

1 *Mariane Sophie* Hammershaimb er 29 ára ógifta dóttir landfútans í Tórshavn.

1 *Marthe* er 67 ára kona í Kvívík.

1 *Mette* er 49 ára ógift systir Sámals bónda í Kirkjubø.

9 *Rachel* eru tríggjar í Tórshavn og ein í hvørjari av bygdunum Kirkjubø, Velbastað, Hesti, Kaldbak, Hósvík og Kvívík. Aldur: 10—50 ár. Sí eisini R. Sophie.

1 *Rachel Sophie* er ársgomul dóttir smiðin Sámal Jákup Debes í Tórshavn.

3 *Rebecka* eru 75 ára ógift »huusarm Krøbling og sengeliggende« og 51 ára kona Adam Isachsens, handilsdragara í Tórshavn. Hin triðja er 25 ára bróðurkona Sámals bónda í Kirkjubø.

Regina finst bara í samanseting Maren R.

5 *Sara* eru tríggjar í Tórshavn, ein í Norðradali og ein í Kaldbak. Aldur: 1—60 ár. Sí eisini S. Malena og S. Maria.

2 *Sara Malena* eru 13 ára bóndadóttir á Sundi og 2 ára smágenta í Nólsoy.

2 *Sara Maria* eru 25 ára matmóðir í Tórshavn og 4 ára smágenta í Kollafirði.

8 *Sigga* eru í øllum sóknum í Suðurstreymoy. Aldur: 5—66 ár. Í Norðstreymoy eru tær skrivaðar Zigge. Si eisini S. Dorthea, S. Malena og S. Maria.

1 *Sigga Dorthea* er 10 ára fosturbarn á Kirkjubøargarði.

2 *Sigga Malena* eru 22 ára ógift bóndadóttir í Kirkjubø og 11 ára smágenta í Tórshavn.

1 *Sigga Maria* er 3 ára smábarn í Tórshavn.

4 *Sophia* eru 43 ára arbeiðskona í Hoyvík, 39 ára arbeiðskona í Saksun, 13 ára arbeiðskona í Kaldbak og eitt 3 ára barn í Vestmanna. Haraftrat eru 39,ið hava S. sum seinna fornavn av tveimum, og ein eitur S. Elisabeth.

1 *Sophia Elisabeth* er 17 ára genta í Tórshavn.

Stine finst bara í samanseting S. Malene.

1 *Stine Malene* er ársgamalt barn í Tórshavn.

26 *Sunneva* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Ein í Tórshavn er skrivað Synneve.

61 *Susanne* eru í øllum sóknum uttan Kaldbaks sókn, men har er ein Susanna Maria. Fimm aðrar hava S. sum fyrra navn av tveimum fornøvum, og eisini hava fimm S. sum seinna navn av tveimum.

2 *Susanna Catrina* eru 22 ára genta í Nólsoy og 10 ára genta í Tórshavn.

1 *Susanne Malene* Nolsøe er 3 ára smágenta úti í Nólsoy.

3 *Susanne Maria,* allar yngri enn 12 ár, í Tórshavn, á Sundi og í Kollafirði.

Sybilla finst bara í samanseting Maren S.

Synneve sí Sunneva.

1 *Valborg* er 40 ára arbeiðskona í Toftum, Vestmanna.

11 *Zigge* eru allar í Norðstreymoy. Eingi børn eru teirra millum. Í Suðurstreymoy eru tær skrivaðar Sigga. Z. (S.) finst ikki sum seinna navn av tveimum fornøvnum, men sum fyrra navn í ymsum samansetingum.

2 *Zigge Catrine* eru 54 ára kona og ársgomul genta, báðar í Vestmanna.

1 *Zigga Maria* er 28 ára genta á Skælingi. Sí eisini Sigga Maria.
2 *Zigge Sophie* eru 24 ára genta í Vestmanna og 10 ára genta í Vík.
851 kvinnur í Streymoyar sýslu 1801

Mannanøvn í Streymoyar sýslu 1801

4 *Abraham* eru 76 ára einkjumaður og 9 ára abbasonur hansara í Vík, 55 ára gamal drongur á Sundi og 12 ára bóndasonur í Vestmanna.
1 *Adam* Isachsen er 38 ára handilsdragari í Tórshavn.
10 *Andreas* eru tríggir í Vík, ein í Tjørnuvík, ein í Saksun, tveir í Kollafirði og tveir í Kaldbak. Hesir eru allir tilkomnir menn, 24—65 ár, men í Kirkjubø er 4 ára fosturbarn, og seks hava A. sum seinna navn í samansetingum.
5 *Anthonius* eru tveir í Tórshavn, ein í Nólsoy, ein í Kvívík og ein á Skælingi. Aldur: 12—61 ár.
4 *Augustinus* eru 70 ára einkjumaður í Tórshavn, 64 ára einkjumaður í Hoyvík, 58 ára bóndi í Kaldbak og 29 ára húskallur í Kvívík.
5 *Berent* eru tveir í Kaldbak, 79 og 25 ár, tveir í Kollafirði, 27 og 7 ár, og ein 12 ára bóndasonur á Sundi. Teir í Kollafirði eru skrivaðir Bernth.
3 *Berthel* eru 50 ára maður í Vestmanna, 39 ára maður í Hósvík og 29 ára gamal drongur í Tjørnuvík.
Carl finst bara í samansetingum Johan C. og C. Friderich.
1 *Carl Friderich* Kyhns er 46 ára kommandantur í Tórshavn.
2 *Christen* eru 26 ára sonur prestaeinkjunnar í Kollafirði og 8 ára sonur ein soldát í Tórshavn.
14 *Christian* eru allir í Suðurstreymoy uttan ein í Streymnesi. Aldur: 2—66 ár. Haraftrat eru 17, ið hava C. sum seinna fornavn av tveimum, tríggir hava C. sum fyrra navn av

tveimum fornøvnum, og teir tveir, ið hava trý fornøvn, hava C. teirra millum.

2 *Christian Fridrich* eru 54 ára studentur og 42 ára soldátur, báðir í Tórshavn.

1 *Christian Ludvig* er 6 ára sonur smiðin Sámal Jákup Debes í Tórshavn.

2 *Christopher* eru 58 ára maður í Tórshavn og 63 ára maður í Vestmanna. Sí eisini Niels C.

1 *Claus* Lund, Studiosus Theologiæ, er 63 ár og giftur. Býr í Tórshavn.

6 *Clement* eru tveir í Tórshavn, tveir í Hesti, ein í Nólsoy og ein í Saksun. Aldur: 1—56 ár. Hann í Saksun er skrivaður Clemen.

1 *Colbiørn* Sivertsen er 17 ára drongur í Hesti.

18 *Daniel* eru í øllum sóknum uttan Hvalvíkar sókn. Aldur: 1—70 ár. Haraftrat hava seks D. sum fremra navn av tveimum, og ein hevur D. sum tað seinna av tveimum fornøvnum.

3 *Daniel Jacob* eru 32 ára bóndi í Kvívík og tveir 16—17 ára dreingir í Tórshavn.

2 *Daniel Pauli* eru 15 ára drongur í Tórshavn og 9 ára bóndasonur á Velbastað.

1 *Daniel Peter* er 6 ára bóndasonur á Miðgerði í Kollafirði.

9 *David* eru allir í Norðstreymoy: Fimm í Tjørnuvík og ein í hvørjari av bygdunum Hósvík, Vík, Saksun og Kvívík. Aldur: 5—49 ár.

1 *Diderich*, 33 ár og giftur, er uppsitari á náðinsgarðinum í Kollafirði.

6 *Dione*, allir í Suðurstreymoy: Tveir í Tórshavn, tveir á Velbastað og tveir í Nólsoy. Aldur: 1—53 ár.

1 *Elias* er 60 ára húsbóndi í Kvívík.

1 *Erich* er 23 ára húskallur í Kirkjubø.

Frantz finst bara í samanseting Jørgen F.

Friderich finst bara í samansetingum Carl F., Chr. F., Jacob F., Jens F., Johan Chr. F. og Ove Chr. F.

1 *Gabriel* er 78 ára húsbóndi í Nólsoy.

Gad er seinna fornavn ella millumnavn hjá Jørgen G.

2 *Gregers* eru 74 ára giftur »Magister og Rector Scolæ, emeritus« og 28 ára ógiftur soldátur, báðir í Tórshavn.

2 *Gregorius* eru 54 ára abbi og ársgamal abbasonur hansara, báðir í Vestmanna.

6 *Gutte* eru allir í Norðstreymoy uttan ein í Tórshavn. Aldur: 1—59 ár.

1 *Haagen* er 14 ára drongur í Tórshavn, uppkallaður eftir abbanum.

Hagæus finst bara í samanseting Jacob H.

5 *Halvdan* eru tveir í Tórshavn, tveir í Vestmanna og ein í Leynum. Aldur: 8—82 ár. Teir í Norðstreymoy eru skrivaðir Haldan.

58 *Hans* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Haraftrat eru 11, ið hava H. sum fyrra navn av tveimum, og ein hevur H. sum tað seinna av tveimum fornøvnum.

1 *Hans Andreas* er 12 ára sonur snikkarans Jacob Mathias Karbech í Tórshavn.

2 *Hans Jacob* eru 14 ára sonur ein kalsmann í Tórshavn og 7 ára sonur ein konstápul í Tórshavn.

1 *Hans Lauritz* er ársgamal sonur sorinskrivarans í Tórshavn.

1 *Hans Ludvig* er 10 ára sonur eftirløntan konstápul í Tórshavn.

1 *Hans Nicolai* er 3 ára drongur í Kollafirði.

1 *Hans Pauli* Johannesen er 29 ára »Handels Betient« í Tórshavn.

3 *Hans Peder* eru tveir 11—12 ára dreingir í Tórshavn og ein 3 ára drongur í Kollafirði.

1 *Hans Zacharias* er 12 ára drongur í Kvívík.

1 *Harald*, 2 ára sonur ein soldát, er uppkallaður eftir móðurfaðiri sínum, og er einnevndur í Streymoyar sýslu 1801.

13 *Heine* eru tríggir í Tjørnuvík, allir eldri enn 50 ár; í Vestmanna eru 74 ára abbi og 9 ára abbasonur, og haraftrat eru ein í hvørjari av bygdunum Skælingi, Saksun, Haldórsvík, Streymnesi, Kaldbak, Koltri, Hoyvík og í

Tórshavn. Aldur: 9—54 ár. Teir báðir í Tórshavn og í Hoyvík eru skrivaðir Heyne.

8 *Henrich* eru tríggir í Haldórsvík, aldur: 12—18 ár, tveir í Hesti, aldur: 17 og 60 ár; 70 ára bóndi á Velbastað og tveir 1—8 ára dreingir í Tórshavn. Haraftrat er H. fyrra navn í samanseting H. Martin og seinna navn í samansetingum Jens H., Joen H. og Johan H.

1 *Henrich Martin* Schnell er 59 ára »Chirurgus« í Tórshavn.

2 *Herman* eru 10—15 ára dreingir, báðir í Tjørnuvík.

8 *Isach.* Elsti Ísak er 90 ára gamal drongur á Sundi. Næstur er 75 ára verfaðir »Skipper Hansen« í Tórshavn, og har er eisini 21 ára húskallur hjá landslæknanum. Ein Ísak er í hvørjari av bygdunum Kirkjubø, Velbastað, Hvalvík, Saksun og í Vestmanna. Aldur: 12—25 ár.

2 *Iver* eru 40 ára húsmaður í Kvívík og 21 ára ógiftur húsmanssonur í Kollafirði.

69 *Jacob* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Haraftrat eru 7, ið hava J. sum fremra navn av tveimum og 8 hava J. sum tað seinna av tveimum fornøvnum.

1 *Jacob Andreas* er 11 ára sonur ein kalsmann í Tórshavn.

1 *Jacob Friderich* er 46 ára ógiftur sonur Christine Buus, »Chirurgs Enke med Pension«.

1 *Jacob Hagæus* er 11 ára sonur skómakara Peder Jacobsen í Tórshavn.

1 *Jacob Mathias* Karbech er 51 ára snikkari í Tórshavn.

1 *Jacob Michael* er 12 ára sonur prestaeinkjunnar Elsu Mariu Winther í Tórshavn.

2 *Jacob Zacharias* eru 24 ára bóndasonur í Tjørnuvík og 13 ára húsmanssonur í Kvívík.

1 *Jan* er 14 ára bóndasonur í Nólsoy.

8 *Jens.* Elstur er 88 ára fátækramaður í Kvívík. Í Kollafirði eru 36 ára bóndi á Oyrareingjum og 20 ára lamin bóndasonur á Todnesi. Í Hvalvík er 10 ára bóndasonur. Í Tórshavn eru 36 ára konstápul og 12 ára drongur. Á Argjum er 26 ára húskallur, og í Kirkjubø eitur ein bróðir Sámals bónda J. Sí eisini teir 7, ið hava J. sum fremra navn av tveimum.

3 *Jens Christian* er hin 55 ára ógifti studenturin Jens Chr. Svabo og ein 17 ára drongur í Tórshavn, og í Kollafirði er hin 28 ára Sjóvarbóndin, Jens Chr. Diurhuus.

1 *Jens Friderich* er 18 ára sonur snikkarans Jacob Mathias Karbech í Tórshavn.

2 *Jens Henrich* eru 3 ára sonur Sjóvarbóndans í Kollafirði og 90 ára Jens Henrich Karbech í Tórshavn.

1 *Jens Nicolai* er 27 ára giftur sonur bóndans á Heyggi í Kollafirði.

2 *Joachim* eru 32 ára ógiftur prestur í Sandagerði og 28 ára soldátur í Tórshavn.

104 *Joen* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Eisini er J. fyrra navn í samansetingum J. Henrich, J. Ole, J. Peter og J. Simon, og J. er vanligasta mannanavn í Streymoyar sýslu 1801.

1 *Joen Henrich* er 3 ára smádrongur á Velbastað.

1 *Joen Ole* er 10 ára sonur uppsitarans úti á Bø í Kirkjubø.

1 *Joen Peter* er 3 ára bóndasonur við Svartá í Saksun.

1 *Joen Simon* er 20 ára ógiftur húskallur í Hósvík.

2 *Johan* eru 9 ára fosturbarn á Heygum í Vestmanna og ein 13 ára drongur í Tórshavn. Sí eisini J. Carl, J. Chr. Fr., J. Henrich, J. Peter, Melchior J., Olaus J. og Samuel J.

2 *Johan Carl* eru 54 ára maður og 5 ára drongur, báðir í Tórshavn.

1 *Johan Christian Friderich* er 2 ára sonur Sjóvarbóndans Jens Christian Diurhuus í Kollafirði.

2 *Johan Henrich* eru 45 ára bóndi í Hvalvík og 8 ára drongur í Tórshavn.

5 *Johan Peter*. Fýra eru í Tórshavn: 45 ára soldátur, 25 ára trummusláari, 15 ára sonur ein konstápul og ársgamal drongur, hvørs faðir og abbi báðir eru soldátar. Í Hósvík er 20 ára ógiftur bóndasonur.

61 *Johannes* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Sí eisini Poul J.

Jørgen finst bara sum fyrra navn av tveimum fornøvnum.

3 *Jørgen Christian* eru 61 ára umsjónarmaður á Argja hospitali og tveir 10 ára dreingir í Tórshavn.

2 *Jørgen Frantz* eru 35 ára sonur fútans Wenceslaus Hammershaimb og 13 ára sonur fráfarna handilsfyrisitarans Sámal Hammershaimb í Tórshavn.

1 *Jørgen Gad* er 8 ára sonur sorinskrivarans. Gad er ættarnavn móðurinnar.

1 *Jørgen Martin* er 13 ára sonur Henrich Martin Schnell, Chirurgus í Tórshavn.

3 *Lars* eru tveir í Tórshavn og ein í Vestmanna, allir yngri enn 14 ár. Sí eisini L. Andreas og L. Christian.

1 *Lars Andreas* er 11 ára sonur Mads Winther, Underkiøbmand ved Handelen í Tórshavn.

3 *Lars Christian* eru 55 ára húskallur á Húsagarði í Tórshavn, 28 ára húskallur í Sandagerði og 12 ára drongur í Tórshavn.

1 *Lauritz* er 47 ára sorinskrivarin í Tórshavn. Sí eisini Hans L.

Lave finst bara í samanseting Peder L.

1 *Lucas* er 6 ára sonur bóndans á Sundi.

Ludvig finst bara í samansetingum Christian L. og Hans L.

1 *Mads* Winther er 53 ára Underkiøbmand ved Handelen í Tórshavn.

3 *Magnus* eru tveir bóndasynir í Hósvík, 5—29 ár, og 25 ára Landskyldbod-Drager í Tórshavn. Sí eisini M. Peder.

1 *Magnus Peder* er ársgamal sonur ein handilsdragara í Tórshavn.

Martin finst bara í samansetingum Henrich M. og Jørgen M.

2 *Mathias* eru 74 ára fyrrv. korpurálur í Tórshavn og 50 ára traðarmaður (lever af noget lejet Jord) í Tjørnuvík. Sí eisini Jacob M.

Melchior finst bara í samanseting M. Johan.

1 *Melchior Johan* er ársgamal sonur sorinskrivarans í Tórshavn.

31 *Michel* eru í øllum sóknum og í øllum aldri. Sí eisini Jacob M. og Thomas M.

5 *Morten* eru 48 ára soldátur og tveir 2—8 ára dreingir í

Tórshavn, 49 ára faðir Dánjals bónda í Hesti og 28 ára giftur húskallur á Velbastað.

1 *Mourits* Lund er 72 ára bóndi í Hoyvík. Sí eisini M. Daniel.

1 *Mourits Daniel* er 18 ára abbasonur hin einnevnda Mourits í Hoyvík.

27 *Niclas* eru í øllum sóknum og í øllum aldri.

